Viðmerking:

# Norra – nýtt hjálandaveldi í Føroyum



Tað var ein mikið rørandi søga, sum stóð at lesa í Sosialinum týsdagin 23. mai. Ein rættiliga átuligur biti fyri almenningin og serliga politikarar, soleiðis sum søgan var borin fram.

Alivinnan er komin heimaftur, var feita yvirskriftin. Men tað var tá vælsignað, mundu fleiri okkara hugsavit syndalesarar, sum stundum vera tikin í gleiðbeint at bíta á yvirskriftir. Tær eru jú til tað sama. Yvirskriftirnar. Hvat var tað ikki vælsignað, at fáa nakað aftur, sum kanska onkursvegna er gloppið okkum av hondum, og hvar man tað so hava verið? Ein søtur biti hjá øllum og fullveldismonnum, nú okkurt legst afturat. Og tá er tað, at tú rakfødd setist at lesa at frætta okkurt gott. Endiliga! Tí tað, sum er gott er ikki ringt.

**Samandráttur**
Søgan 23.mai sigur okkum:
– at Vestlax er vorðin ein risi.
– at tær alistøðir, sum norska felagið Pan Fish herfyri keypti í Føroyum nú
– vera lagdar undir nýtt felag, sum fer at eita Vestlax.
– at føroyingar aftur fáa avgerðarrættin yvir hesum alibrúkum.
– at norðmenn hava keypt ein part av Vestlax, men latið avgerðarrættin yvir
– til alivinnuna í Føroyum, men at býtið er soleiðis helvt um helvt.
– at Vestlax nú eigur eina knappa helvt av føroysku alivinnuni.

**Norðmenn eru fittir**
Hesin lesnaður gerst alt meira kryptiskur, sum tú togast oman teigarnar. Ikki tí, greinin er væl skrivað, og blaðmaðurin hevur helst endurgivið stjóran í Vestlax rætt, sum hevur dugað væl at selja sína søgu. Men fyri okkum, sum plaga at halda okkum til barnakrossorðini í teirri vissu trúgv, at tað klára vit, kann vera trupult at skilja, at til dømis avgerðarrættur og meiriluti ikki longur hevur okkurt við prosent at gera. Atkvøðugreiðsla og avgerðarrættur í partafeløgum plagar at vera í mun til partabrøvini. So hetta er ein gáta. Helvt um helvt - gevur tað avgerðarrætt?

Eftir situr lesarin og spyr, hvussu tað ber til, at norðmenn eru so forbiði fittir? Henda Pan Fish ASA – er hetta okkurt filantropiskt vælgerðarfelag? Ein nýggjur fullveldisstuðul, kanska, sum av berari góðsku hevur verið so vælsignað at flutt okkum nakað aftur, sum innast inni ikki tilkom teimum?

**Holstýrismaðurin**
Seinni frættist, at fyri at hesin handilin skal gerast lógligur sambært føroyskari lóggávu, ætlar Finnbogi Arge sær at brúka eitt hol. Soleiðis bjóðar landsstýrismaðurin, sum skal útinna lógina, seg beinleiðis fram sum mótpart hjá lóggevarum. Tað er ikki ókent, at vinnan sjálv ella tey, sum vilja hava sum mest burturúr, royna at leita upp tey hol í lógum, sum møguliga eru at finna til egnan fyrimun, men at landsstýrismaðurin sjálvur av sínum eintingum ger tað, sigur mær, hvar hann sjálvur trívist best. Ytst á eggini við vindinum í ryggin. Men tað er kanska politikkur í tí eisini.

**Altjóðagering a la Finnboga Arge**
Finnbogi Arge sigur við Útvarpið, at hesin handilin eisini hongur saman við teirri altjóðagering, sum er uppi í tíðini. Hann bevari okkum móti øllum ráki, skal hetta vera fyrimyndin, tað sigi eg bara. Tí í hesum føri er rímiligt at spyrja, hvør hevur keypt seg inn hvar og um sínámillum styrki.

Norska felagið, sum umfatar einar 1700-2000 partaeigarar, hevur keypt helvtina av Vestlax, sum afturfyri fær í mesta lagi eini 5% í norska felagnum, giti eg. So hetta er altjóðagering av sjáldsomum slag. Tað er vist. Sum maðurin segði - alt er relativt. Men eingin hevur hildið uppá, at tað altíð er gott í øllum lívsins viðurskiftum.

**Lóg er lóg**
»Alilógin« sigur, at útlendingar kunnu bert eiga ein triðing í føroyskum felag. Skal hesin handilin fáa politiskt vælsignilsi, krevst ein anarkistiskur holdningur til somu lóg, sum landsstýrismaðurin vónandi og væntandi verður einsamallur um.

Men hvussu langt er málið komið? Henda sølan av partabrøvum út av landinum, sum man vera hin størsta í føroyskari søgu? Tað er so ikki nakað man soleiðis bara ger »over night«. Manglar bara at legalisera handilin so ella so?

Norsku versjónina hava føroysku fjølmiðlarnir so ikki funnið fram. Men norska blaðið Intra Fish skrivar mikudagin 24. mai: sitat - »Ifølge Finansavisen har Pan Fish gjort et råbilligt oppkjøp på Færøyene. Pan Fish får 50 % av selskapet (Vestlax), og fordi store deler av oppgjøret gjøres med egne aksjer kjøbt til godt under 50 kroner stykket, bliver oppgjøret billig for aksjonærene i Pan Fish«. Víðari stendur: »Gjennom oppkjøpet får Pan Fish kontroll med store deler av lakseproduktionen på Færøyene«.

»Råbilligt« ljóðar í mínum oyrum, sum vóru føroyingarnir snýttir. Kanska roynir Pan Fish at hála nakað inn aftur av tí, teir sjálvir hava mist í Føroyum.

Eftir øllum at døma ber útlendingum til, við Finnbogasa vælsignilsi um altjóðagering, at koma til Føroya á útsølu, nú alivinnan er vorðin tilboðsvøra. Landsstýrismanninum man dáma hetta, eftirsum hann við uppskotinum frá landsstýrinum í 98, vildi loyva útlendingum at eiga 49%. Men tann parturin av uppskotinum kom ikki ígjøgnum. So tað ber ikki til! Hvat nú?

Hvussu hetta málið fer at venda í samgonguni, er ikki gott at vita. Hvussu Fólkaflokkurin fær sítt øgiliga økonomiska frælsi at hanga saman við tí at selja út av fænum, er ili at skilja. Ella um Tjóðveldisflokkurin fer at finna seg í, at okkara politiska frælsi skal byggja á vinnur, riknar in absentia. Fyri summi sjálvs-stýrisfólk man vera frægast, í hesum málinum, at hava tunguna mitt í munninum. Tað er skilligt.

Men hugaligt hevði verið, um onkur tónaði flagg. Tað er huldusliga stilt um hetta málið. Kanska hevur hetta so lítið uppá seg fyri samgongu, sum hesa. Kanska ikki tað frægasta hjá samgongulimum at røða um, hóast allir uttan Fólkaflokkurin atkvøddu ímóti 49 prosentunum, havandi alt tað í huga, sum hesi hava megnað at spælt okkum av við. Vaktar og bjargingarskipið, undirsjóvartunnilin etc. etc. Men onkuntíð má man reisa seg aftur, og vísa á ein vilja so ella so.

Sjálv helt eg, at flestu vildu kennast við og verja hugtakið ogn Føroya fólks. Men tað var kanska bara sum hugtak.

**Katrin Dahl Jakobsen**

## 10 præster – om igen



15 præster rykkede ud med en undskyldning til de danske biskopper. 10 af disse præster følger nu deres undskyldning op med en præcisering (Dimmalættin og Sosialurin d. 3/6-2000). De 10 ønsker ikke selv personligt at foretage en kirkelig markering af registreret partnerskab, selvom de ifølge kirkeministeriet har mulighed for det. Mon der var nogen, der havde forstået det første udspil således? Næppe.

I 10 vil gerne forsikre os andre om, at I tager Guds Ord alvorligt. Det glæder os. Hvorfor kamuflerer I så jeres første brev med denne »Staðfesting«? Hvorfor giver I ikke de fire præster en undskyldning og sammen med dem siger »nej, tak« til de biskopper, der legitimerer homoseksuelt samliv og har indført en kirkelig markering af registreret partnerskab. Sagen handler jo ikke om, at I personligt ikke vil foretage en sådan kirkelig markering eller personligt er uenige med dem, der foretager en sådan markering. **Sagen handler om, hvad der kan læres og praktiseres i en kristen kirke.**

4 præster har sagt »nej, tak«, fordi disse biskopper lærer og handler imod Guds Ord ved at legitimere homoseksuelt samliv. Disse biskopper har derved sviget næsten og skjult Jesus for mennesker. I 10 fastholder stadig, at man sagtens kan virke som prædikant i menighedens forsamling, selvom man legitimerer homoseksuelt samliv. Kærlighedens apostel, Johannes, skriver i sit andet brev: »Hvis nogen kommer til jere og ikke fører denne lære (Kristi lære), så tag ikke imod ham i jeres hus, og byd ham ikke velkommen; for den, der byder ham velkommen, gør sig delagtig i hans onde gerninger« (2. brev vers 10-11). De biskopper, der legitimerer homoseksuelt samliv, fører ikke Kristi lære. Det er vel også det, I selv vil sige med jeres »Staðfesting«? Alligevel fastholder I, at det er en ære, at få en sådan biskop som prædikant og I byder stadig sådanne prædikanter velkomne. Det har jeres »Staðfesting« ikke ændret det mindste på. Kun ved at sige »nej, tak« til bl.a. de danske biskopper, kan I sige nej til deres vranglære. Så længe I fastholder jeres »ja, tak« til dem, så længe gør I jer ifølge Guds Ord også medskyldige i deres onde gerninger.

Klaksvig 3/6-2000
**Peter O. K. Olofson**

## Bindið frið

Sum ein av teimum mongu í útlegd havi eg fylgt við, hvat fyriferst innan kirkjulívið heima á landi.

Og eg gerist - vit eru fleiri - hørm.

Eg havi lært, ja heilt frá sunnudagsskúlanum, at tað er ikki givið okkum at døma. Matt. 7,1 - Luk. 6,37 - Luk 12,14.

Kirkjan er at fylkjast um, og hevði eg vónað, nú Føroyar halda 1.000 ára dag fyri Kristindómsins komu til landið, at stríðið, sum tíverri hevur verið tey seinastu 10 árini til óbøtandi skaða fyri kirkjuna, nú var niðurlagt.

Til tykkum, sum byrja ár 2.000 við at bera brenni til stíðsbálið, fari eg at siga:

»Bindið frið.«

Alt tað, tit vilja, at menn skulu gera móti tykkum, tað skulu tit gera móti teimum, tí hetta er lógin og profetarnir. Matt. 7,12.

**Sonja á Argjaboða**
**Århus**

## Diesel dálkar umhvørvið

Føroyar eru roknaðar fyri at vera eitt reint umhvørvi, men eru vit tað?

Tað fall mær fyri bróstið herfyri í tí góða sólskinsverðrinum, tá eg fór ørindi í býin. Eg fekk ilt, reverentar talt ilt av øllum dieselosinum frá bilunum. Har stóð m.a. ein ung kona við barni í koyristóli, og hvat hetta lítla barn fekk í seg av dieseloli kann enn ikki samanlíknast við sigaretroyk. Tey hostaðu verri enn nakað gamalt tubbaksvrak. Eg rýmdi og fór niðan í SMS, og har var hvaðani verri í parkeringskjallaranum. Tað stinkaði!

Uttan at vera "frelst" uppá nakran máta haldi eg, at allir hesir dieselbilar eru við at fáa yvirhond. Fólk fara yvir til diesel, tí tað er bíligast. Bilar eru her, og teir skulu vera verandi, men hví skulu teir "premierast", sum dálka mest? Blýfrítt bensin hevur leingi verið at fáa, og vil ein umhvørvinum væl, so er tað frægast hvat dálking viðvíkur. Men diesel er nógv bíligari at koyra. Men eg fari at hætta mær at siga, at hevur ein ráð til at koyra bil, so hevur ein eisini ráð til at halda umhvørvið so reint sum gjørligt. Hesir dieselbilar hava eisini tann ampa, at teir taka longri tíð at verma upp, og so lata fólk teir standa í tómgongd til teir eru heitir nokk. Serliga um morgnarnir í búðstaðarøkjum kennist hetta sárt fyri smábarnalungur, og eisini fyri tey eldri.

So hetta er ein áheitan til tykkum, sum leggja gjøld og annað uppá bilar og bensin. **Gerið diesel dýrt!** So fara fólk nokk at koyra við reinari brennievni. Aðra staðni í heiminum er diesel minst líka dýrt sum annað brennievni, hví skulu vit _premiera" dálkingina?

**Hanna Joensen**



Viðmerking:

# Eitt heimastýri við framgongd

Í eini grein í bløðunum í farnu viku, skirvar Høgni Hoydal landsstýrismaður um búskaparkreppuna í nítiárunum.

Enn einaferð eydnast tað honum at kalla kreppuna fyri "kreppan **undir heimastýrinum**" og eisini skrivar hann um tann "sjúka **heimastýrisbúskapin**".

Hetta er ein ótrúliga snildislig orðing, tí við hesum hevur hann ikki beinleiðis sagt, at sjálv heimastýrisskipanin var orsøkin til at kreppan kom. Men lesarin skilir tað kortini soleiðis, og hetta er júst tað, sum landsstýrismaðurin vil hava lesaran at skilja.

**Kavarasjúka**
Høgni Hoydal dugir væl at nýta myndatalu, og hesaferð hevur hann valt ein kavara sum myndaevni. Eftir at føroyski búskapurin hevur verið ein túr niðri á botni, er hann nú sum ein kavari á heimleið á veg uppaftur gjøgnum sjógvin.

Men henda uppgongd má ikki ganga ov skjótt, tí tað er vandamikið at flyta úr havdýpinum og upp til vatnskorpuna við ov nógvari ferð. Kroppurin tolir ikki hetta skjótt minkandi trýstið, og tú kanst fáa kavarasjúkuna. Tí noyðist landsstýrið nú at traðka á bremsuna.

Men Høgni Hoydal gloymir at nevna, at henda ógvusliga uppgongdin, er eisini ein partur av tí sonevnda heimastýrisbúskapinum. Hann gloymir at siga, at tað er undir heimastýrinum, at tað sambært honum sjálvum nú gongur so væl, at tað er meira enn hvat eitt samfelag kann tola.

**Kvetta luftslanguna**
Ímeðan hesin kavarin fer upp ígjøgnum sjógvin við nógvari ferð, eru tað nøkur, sum fyri ein og hvønn prís vilja kvetta luftslanguna. "Vit skulu ikki vera bundin at øðrum, og eingin skal geva okkum "fremmanda luft"", siga tey. Tó vilja hesi hava ein lítlan "luftlumma" (eina skiftistíð), sum tey kunnu liva av í eini 15 ár.

Hetta er júst tað sum skal til, fyri at venda uppgongd til niðurgongd. Tú fært eina flaggstong í New York, men sleppur annars at liva restina av lívinum á tí búskaparliga havbotninum.

**Hvussu verður búskaparvøksturin roknaður ?**
Vanligi føroyingurin kann ikki vita, hvussu landsstýrið roknar seg fram til øll tølini, sum í hesum døgum verða serveraði fyri føroya fólki, og sum skulu vísa, hvussu gongdin er í føroyska búskapinum. Tí er tað lætt hjá landsstýrinum at villleiða fólkið, við at vísa á tilvildarlig tøl.

Eg kann nevna sum dømi, at í faldaranum, sum landsstýrið hevur gjørt um fullveldisætlanina, verður sagt (á síðu 24), at búskaparvøksturin hevur seinastu fimm árini verið umleið 6 prosent í miðal.

Men í tíðindaskrivinum, sum landsstýrið sendi donsku fjølmiðlunum aftaná fyrra samráðingarfundin í Keypmannahavn stendur: "Væksten i den færøske økonomi har de sidste 6 år været 9,8 % i gennemsnit".



Tað vil siga, at miðal búskaparvøksturin 6 tey seinastu árini hevur sambært landsstýrinum verið 3,8 prosent hægri, enn hann hevur verið 5 tey seinastu árini. Um hetta passar, so høvdu Føroyar fyri 6 árum síðani ein búskaparvøkstur uppá ikki minni enn 41,5 prosent.

Hetta er so langt úti, at um vit venda aftur til myndina av kavaranum, so hevði hann ikki bara fingið kavarasjúkuna, men hann hevði lopið leysur úr sjónum.

Hetta ljóðar so gott, at ein freistast til at kalla tað við orðunum hjá Høgna Hoydal: "Heimastýrisbúskapur".

Helgi Abrahamsen

## Onga skiftistíð, takk!



Nú hava vit hoyrt aftur og aftur og upp í saman um skiftistíð, og hvussu long henda skiftistíð skal verða, Næstan ongin tosar um annað í hesum samráðingartíðum.

Líka so nógv sum hetta fyribrigdi nú verður umrøtt, líka so sannførd eru tey flestu nú vorðin um, at **hetta** er tað, vit skulu tosa um. Men í veruleikanum er hetta bert ein partur av øllum, og í mínum eygum sær nú út sum um alt annað er vorðið óaktuelt, og eg giti, at tað er ikki uttan áhuga landsstýrisins, tí endamálið við skiftistíðini er fullveldi, og at vit skulu sleppa okkum av við donsku stuðulsveitingina, antin so ella so. Strategiin er jú løgd.

At úrslitið fer at halla á tann bógvin, er ikki óhugsandi, tí við tí niðrandi umrøðu ríkisveitingin hevur fingið frá okkara landsstýrisflokkum og umboðum, bæði her heima og ikki minst í Danmark, so skuldu danir ikki vilja okkum so ilt, at teir ikki tóku stuðulin aftur sum skjótast fyri okkara egna besta, meeen …. nú var tað ikki júst soleiðis teir meintu tað hóast alt, siga okkara landsstýrisflokkar!!

**Fólk ørkymlast**
Fólk eru ørkymlaði, tí Hvíta Bók, sum fyrst var søgd at skula lýsa øll mál og svara øllum spurningum, hon lýsti ikki øll mál frá øllum síðum, og hon svaraði ikki øllum spurningum, men hon gjørdist ein "amboðskassi", sum landsstýrismaðurin Høgni Hoydal boðaði frá, tá hon var vorðin almenn. Teir og tey, sum skrivaðu hana, høvdu gjørt eitt stórt og gott arbeiði, tað skal slásast fast, men tey sum spurdi rættiliga nær, tá spurningar kundu setast aftaná, fingu fleiri ferðir sama svarið: "Hatta vóru vit ikki biðin um at kanna!!" Og parturin um íslandsku kanningina, og sum skrivað var í Íslandi viðvíkjandi búskapinum, hann mundi ongatíð komið fram!!??

Men búskaparligi parturin í Hvítu Bók um skiftistíðina segði veruliga nakað um framtíðina og vælferðina, og tað er nú tann eymi spurningurin. Spurningurin um longdina á skiftistíðini er vorðin Alfa og Omega í sambandi við Føroya framtíð sum fullveldi, og veljarakanningin, sum setti ein spurning um skiftistíðina, vísti tað menniskjaliga, at veljarin heldur vildi hava skiftistíð uppá 15 ár enn 4 ár, og tað er væl skiljandi, **men tað merkir ikki, at tey øll vilja hava fullveldi.**

**Strategiin**
Landsstýrismaðurin í sjálvsstýrismálum veit, hvussu strategiin skal vera, og nú er ljóskastarin settur á skiftistíðina. At danska stjórnin og danska Fólkatingið meldaði út tíðliga, og tað so sera avgjørt, um stutta skiftistíð, var ikki so heppið fyri strategiina hjá okkara landsstýri, men nú er tó hepnast teimum at venda rákið í kjakinum fyri teir rætta vegin, soleiðis at fullveldið er endamálið.
Og tað er tað, sum ávarast má ímóti, tí vit sum ikki vilja hava fullveldi, vit **vilja onga skiftistíð hava**: Vit ynskja, í tí felagsskapi vit eru, við virðing hvør fyri øðrum og í semju, at samráðast við hin partin av ríkinum um, hvussu vit skipa okkara framtíð best, og sjálvandi skulu vit í Føroyum gjalda tað vit orka. Men okkara mál er : **Onga skiftistíð, takk!**

**Lisbeth L. Petersen**


**Sosialurin**
***– kjakið fer fram hjá okkum***



2 ÁRA FØÐINGARDAGUR Í BEAUTY LINE

Í sambandi við 2 ára dagin tann 8. juni verður eitt úrval av vørum selt við

30%
í avsláttri

Leingi væntaða húðrøktarvøran er nú heimkomin m.a.
Longue vie Corps, kropskrem, sólkrem og reinsikrem í dupultari stødd



BEAUTY LINE
N. Finsensgøta 16 • 100 Tórshavn • Tel. 320321

Sosialurin 311820